# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Nú skulu vit inn at vera við at skapa dystin, tí teir vit spæla ímóti her, eru á sama støði sum vit hóast teir eru tað yngri*

*Bill McLoud Jacobsen, venjari hjá U-19 landsliðnum*

# Har var ikki meira eftir




*Sentrali miðvallarin hjá B36 staðfesti, at Fenerbache er eitt av allar sterkastu liðunum, sum hann hevur roynt seg ímóti – og tá eru landsdystir íroknaðir*

**Fróði Benjaminsen iðraði seg um, at tapið týskvøldið skuldi gerast somikið stórt. Men hann helt, at B36 hóast alt kann vera væl nøgt um europisku luttøkuna í summar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum einav lyklaspælarunum á føroyska A-landsliðnum í fleiri ár er Fróði Benjaminsen ein spælari við drúgvum altjóða royndum. Men hóast talan her hevur verið um nógvar truplar dystir, so ásannaði hann, at Fenerbache var eitt av sterkastu liðunum, sum hann hevur spælt ímóti.

– Tað eru teir nokk. Í styrki, skjótleika og tekniskum førleika eru teir heilt framúr. Sjálvt á einum vølli, sum tí her í Føroyum megna teir at spæla sera skjótt, og tað sigur ikki einki um førleikan.

Og var hetta so kanska eisini tann munurin, sum var á liðunum báðum?

– Tað er tað nokk. Sjálvandi høvdu vit vónað, at vit høvdu klára tað betri, men vit fáa tvey sera keðilig mál ímóti okkum báðu megin steðgin, og tað tekur nakað av dampinum úr okkum. Tað vísir so eisini, at á hesum støðinum verða mistøk revsað mest sum alt fyri eitt.

– Og seinastu løtuna var bara útselt. Allir høvdu givið alt tað, sum var í beinunum, og so seta teir trumf á seinastu 10 minuttirnar.

### Nøgdir hóast stórtap

Europiska ævintýrið hjá B36 er av á hesum sinni. Og hóast teir soleiðis máttu siga farvæl við samanlagt 0-9, so helt Fróði Benjaminsen hóast alt, at teir kunnu vera hampuliga nøgdir.

– Vit megna so at spæla okkum víðari til næsta umfarið, og tað var framúr. Tá vit so møta eitt lið við hesari styrkini, veit eg ikki ordiliga, hvat vit skulu vænta, men tað má so bara takast sum ein uppliving.

– Nú hava vit so eina viku, áðrenn landskappingin fer ígongd. Tað er helst ein fyrimunur hjá okkum, at vit her hava tveir dagar eyka at hvíla okkum, so allir mans kunnu koma heilt fyri seg. Og so mugu vit seta fokus á landskappingina, har málið heilt greitt er at vinna okkum upp aftur í oddin, staðfestir hann.

# Knút og Klæmint vórðu sleptir

**Kappingarnevndin tók ongan tíð málið um teir báðar spælararnar hjá EB/Streymi og B36 upp**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Ítróttardómstólurin sendi Páll M. Joensen málið aftur í kappingarnevndina á triða sinni, var tað við boðum um, at hetta mál skuldi viðgerast við atliti til málini um spæliloyvini hjá Knút V. Vesturtún og Klæminti Matras úr ávíkavist EB/Streymi og B36.

Tá hetta hava verið kravboðini, so eru somu atlit helst tikin. Men sum skilst, so eru hesi mál tó ikki tikin upp av Kappingarnevndini. Vórðu tey tað, so skuldu bæði EB/Streymur og B36 fingið boð frá Kappingarnevndini um, at málini verða tikin upp, eins og feløgini høvdu havt møguleika at tala sína sak.

Hetta er tó ikki hent, og tí er helst greitt, at tey bæði málini eru avgreidd umsitingarliga, og at Kappingarnevndin er vorðin kunnað um, hví hetta er gjørt.

Sum vit áður hava skrivað, so var tó sera ivasamt, hvørt B36 ella EB/Streymur yvir høvur kundu revsast fyri síni brot. FSF hevur áður boðað frá, at hjá Klæminti Matras átti flytingin av spæliloyvinum at verið gjørd longu í 2000. Viðvíkjandi Knút Vesturtún visti Útvarpið fyri 14 døgum síðani at siga, at loyvið hjá honum ikki kom í rættlag fyrr enn 25. apríl. Men tá Knút ikki spældi dyst fyrr enn 30. apríl, kann hetta ikki geva felagnum stórvegis trupulleikar.

# Sjeynda lívið hjá HB farið

**Eftir sjey viðgerðir er HB framvegis úti úr kappingini um Løgmanssteypið. Kappingarnevndin hjá FSF hevur enn einaferð dømt liðið at tapa dystin móti VB/Sumba**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at væl og viriðliga eru farin um fjórða mánaðin , síðani HB og VB/Sumba dystaðust í steypakappingini í fótbólti, er framvegis ógreitt, hvør teirra skal spæla fjórðingsfinalu móti EB/Streymi.

Kappingarnevnd, Aðalnevnd, Dómsnevnd, Kappingarnevnd, Dómsnevnd og Ítróttardómstólur hava higartil viðgjørt málið, og nú hevur Kappingarnevndin so fyri triðu ferð mett, at HB skal dømast at tapa dystin. Soleiðis kann sigast, at HB hevur nýtt sjey lív higartil, og sum onkur tók til, so er spurningurin nú, hvørt felagið er sum kettan, ið vanliga verður søgd at hava níggju av slagnum.

Sum so var ikki stórvegis nýtt í teimum niðurstøðum, sum FSF hevur um málið. Ein meiriluti í Kappingarnevndini er enn sum áður av teirri áskoðan, at HB skal dømast at tapa dystin, tí teir ikki høvdu spæliloyvið hjá Páll M. Joensen í lagi.

Ein minniluti, Høgni í Stórustovu, metti hinvegin ikki, at HB skuldi dømast at tapa dystin. Í viðgerðini vórðu atlit eisini tikin til spurningin um spæliloyvini hjá Klæminti Matras og Knút V. Vesturtún, men mett verður ikki, at tað skal kosta hesum feløgum nakað, at tey hava nýtt hesar spælarar.